# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Uppskot til pensjónskipan

Fíggjarmálaráðið hevur lagt fram uppskot eitt embætismannauppskot um eina framtíðar føroyska pensiónsskipan. Framtíðar pensiónsskipanin hevur nú í mong ár verið eitt heitt umrøðuevni í politikki. Tó er lítið hent uttan at Samhaldsfasti er hækkaður nakað. Tað kann sjálvandi undra, at hetta uppskot kemur frá Fíggjarmálaráðnum og ikki frá avvarandi landsstýrismanni. Okkum tørvar eitt breitt og sakligt orðaskifti um eina framtíðar føroyska pensiónsskipan, og tí kann útspælið frá Fíggjarmálaráðnum koma væl við í hesum orðaskifti. Uttan at fara í smálutir við uppskotinum kann nevnast, at hetta fevnir um tiltøk at minka vøksturin í eldraútreiðslunum, broyting av almannapensjónum, øking av persónligari uppsparing, hækking av pensiónsaldri og prístalsjavning av almannapensjónum. Eisini verða pensjónsviðurskifti í Føroyum samanborin við onnur lond og lýst verður, hvussu stór uppsparing er neyðug.

Millum ítøkiligu tilmælini kunnu nevnast eitt nú 15% tvungið inngjald av øllum lønargjaldingum frá 2018 og inngjald eisini fyri móttakarar av arbeiðsloysisstuðuli, fyritíðarpensión, B-inntøku og almannaveitingum. Víðari verður mælt til, at skattafrádráttur bert verður givin fyri inngjøld til føroyskar skipanir og skattafrádráttur skal bert verða loyvdur fyri inngjøld til ratueftirlønir og til lívlangar veitingar. Eisini verður mælt til, at pensjónsaldurin stigvíst hækkar. Uppskotið eigur at metast sum eitt teknokratiskt íkast til eitt orðaskifti um framtíðar pensiónsviðurskifti. Tilmælini kunnu í støðum tykjast víðgongd og óvanlig, og tað er ódámligt, at tey gomlu verða lýst sum ein samfelagstrupulleiki. Í vælferðarsamfelagum er ein tryggur aldurdómur ein mannarættur og tey gomlu skulu heldur ikki í framtíðini kenna seg sum ein trupulleika. Hetta er enn eitt dømi um ta neoliberalismu, sum tykist vera hugmyndafrøðiliga støðið undir samgonguni: vit hava ikki ráð til ta samhaldsfasta samfelagið, í framtíðini má hvør sæta sær sum best!

Eftir stendur nú ein umfatandi politisk viðgerð av hesum máli. Politiska viðgerðin eigur at taka støði í samgonguskjalinum og hartil í einum breiðum samfelagsorðaskifti millum viðkomandi partar, eitt nú Almanna- og heilsumálaráðið, fakfeløg, politiskar flokkar, pensionistafeløg, peningastovnar og tryggingarfeløg. Tað er sostatt ikki nóg mikið, at uppskotið er umrøtt á einumhvørjum óalmennum fundi við hesar partar. Orðaskiftið skal vera alment, tí her er talan um eitt tað størsta sosialpolitiska mál í okkara tíð. Hetta almenna orðaskiftið kann so hóskandi enda við einum aðalorðaskifti á tingi, so øll politisk sjónarmið verða almenn. Vit fara at gera okkara til at fáa gongd á hetta samfelagsorðaskiftið. Miðlahúsið hevur longu sett hetta á skránna fyri heystið.

**Sosialurin**

## Bjálkin

**SVENNING BORG**
*Vágur*



Undirritaði vil hervið heita á okra landsstýri um at byrja fyrst hjá teimum sjálvum, áðrenn teir fara eftir fiskimonnunum viðvíkjandi skattafráttum/avgjøldum.

Løgtings- og landsstýrisfólk hava telefonstuðul og stuðul fyri at búgva uttan fyri meginøkið og ikki minst fría ferðing við skipum landsins, her átti at verið nakað at farið eftur, áðrenn farið verður til fiskimannin.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum og hansara floksformaður síggja bert flísina í eyganum á fiskimanninum og ikki bjálkan í teirra egna eyga, síggja ikki teirra egna stuðul úr landskassanum.

Fiskimaðurin er tann einasti samfelagsbólkur, sum fer til arbeiðis við dýnuni undir arminum, men so lítla virðing fær hann fyri sítt strev og stríð, at hann verður mest sum jagstraður alla tíðina av embætismonnum og ávísum politikkarum fyri ein skattafrádrátt, hann hevur fingið og sum flest øll hini hava, men sum eitur okkurt annað, so sum frían arbeiðsbúna, bil o.s.f.

Grannalondini hjá okkum bjóða fiskimanninum nógv betri sømdir enn Føroya land, teir seta meira prís upp á fiskimannin og hansara arbeiði enn Føroya land ger, tað verður kanska tann vegin fleiri av okra sera dugnaligu fiskimonnum fara, føroyski fiskimaðurin er ein nógv eftirspurd arbeiðsmegi allastaðni og hevur ongar trupulleikar at sleppa umborð á útlensk skip, so kunnu hini, sum hava so ilt av skattafrátti fiskimannsins, mannað føroysku skipini, so fáa okur at síggja.

Kann bert siga, hvat var Føroya land fátækt uttan fiskimannin.

## Meira skatt og verri tænastur

**HJØRMUND OLSEN**
*Húsavík*

Farna vikuskifti var útoyggjastevna í Mykinesi. Útvarpi hevur greitt frá stevnuni, og millum annað hava lurtarar fingið endurgivið úr eini røðu, sum Olga Biskupstøð, løgtingskvinna úr Tjóðveldisflokkinum, helt har vesturi. Í røðuni segði hon, at undirsjóvartunlarnir eru ein forðing fyri útoyggjunum, tí teir kosta nógvar pengar, sum annars kundu verið brúktir til útoyggjarnar.

Rætt er tað, at undirsjóvartunlarnir (bæði verandi og komandi) kosta nógvar pengar. Men fyri hesar pengarnar fáa vit eina tænastu, sum ger Føroyar til eitt betri land at búgva í. Men tíverri verða pengar eisini brúktir til so nógv annað her á landi, sum vit einki fáa afturfyri.

Floksformaðurin hjá Olgu Biskopstø ferðast dúgliga uttanlands fyri almennar pengar, men higartil hevur tað ikki gjørt Føroyar til eitt betri land at búgva í. Sendistovurnar í Moskva og New York fara eisini at kosta nógvar pengar, men fólkið í Føroyum fær tað ikki betri av tí.

Flokkurin hjá Olgu Biskopstø hevur eisini kastað einar tríggjar milliardir burtur í blokkstuðli, og tað hevur bara gjørt Føroyar til eitt verri land við verri tænastum (til dømis innan heilsuverkið). Tríggjar milliardir er nógv meira enn verandi undirsjóvartunlar og Sandoyartunnilin kosta tilsamans.

Tað einasta sum bindur samgonguflokkarnar saman er ynskið um at yvirtaka og loysa (eitt felags ynski um verri tænastur til fólkið). Øll onnur mál (harímillum undirsjóvartunlarnir) verða sett aftast í røðina til frama fyri hetta eina málið.

Um nakað kann gerast fyri at halda lív í útoyggjunum, so er í lagi at gera tað, men eg eri bangin fyri, at tann tíðin er farin, tí tey ungu vilja sleppa vekk haðani, og uttan ungdóm verður eingin framtíð. Ungdómurin vil hava frítt at fara av bygdini og koma heim aftur tá hann vil, og tað ber ikki til á eini útoyggj.

Endamálið við undirsjóvartunlum er at fáa ungdómin og fólkið annars at trívast, tí annars doyggja bygdirnar út.

Landsstýrið tosar um at fáa útisetar at venda heim aftur, men hvussu skulu fólk, sum hava allar hentleikar, tíma at flyta heim til eitt land, har ikki ber til at ferðast frítt, og har politikarar brúka almennar pengar til at gera tað óliviligari hjá fólkinum meðan spart verður upp á tað, sum kann gera tað liviligari?

## So nú eru aftur sparingar innan serøkið

**NENA THOMSEN**

Hvat er hetta fyri eitt land, vit búgva í?

Nú skal Sernámsdeplin skal spara, tí tey hava veitt ov nógvar stuðulstimar. Um serøkið brúkar meira enn játtað er, ber ikki til at játta meir.

Men so alla tíð at hoyra uppá, at nú skal sparast, tí at tey fáa ov nógv. Men tunnlar mugu vit hava.

Eg spyrji bara, hví kann serøkið ikki fáa ein kjekk á hvørjum ári, hvar stjórin sjálvur ásetur upphæddina. So at okkara børn, ið bera brek fáa alla ta hjálp, sum til ber at fáa. Tað er bílligari í hinum endanum.

Hvat gera tey í samgonguni? Øll hava lovað gull og grønar skógir seinansta løgtingsval, men hvat hendir??? svar: ONKI

- Svimjihyllurin sum var á hvørjum politiskum fundi er ikki liðugur enn. Sagt verður, at hann verður liðugur til skúlarnar byrja aftur. (Onki árstal er ásett.) Men tað er sagt í fleiri ár. Har eru ikki stórar broytingar, síðani vit vóru har í desember í 2007 saman við Sosialinum. Tað hevði verið stuttligt at havt myndir í blaðnum hvørja viku. Finn 5 feilir.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydnaskaale@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Niels Petersen niels@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $13^{30}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.